## Rúni gevst í HB



Rúni Nolsøe verður ikki partur av venjaratoyminum í HB komandi kappingarár. Rúni tók við venjarastarvinum í HB í vár. Og hóast talan gjørdist um silvur, so var talan um hampuliga turbolent ár. Eitt nú varð ein rokada gjørd í summar, soleiðis at Sámal Erik Hentze gjørdist síðustillaður venjari hjá Rúna Nolsøe. Og nú verður Sámal Erik Hentze so einsamallur høvuðsvenjari. Í tíðindaskrivinum sigur HB, at felagið og Rúni Nolsøe ikki kundu koma ásamt um treytirnar fyri framhald av samstarvinum, og at hetta tí steðgar. Enn er ikki greitt, hvør verður hjálparvenjari hjá Sámal Erik Hentze í HB.

## Blackpool vann

Claus Bech Jørgensen var ikki við á liðnum hjá Blackpool um vikuskiftið. Blackpool spældi ímóti Plymouth í næstbestu ensku fótbóltsdeildini, og tað endaði við 2-1 tapi til Blackpool. Plymouth, sum spældi á heimavølli, legði seg á odda í seinna hálvleiki, men seinastu 15 minuttirnar skoraði Blackpool tvey mál. Málskjútti í báðum førum var Liam Dickinson, sum kom á vøllin stívliga eitt korter fyri leiklok.

# Dráttur snávaði

**Oddaliðið styrkti sína støðu í deildini, tá Dráttur á heimavølli mátti lúta fyri ÍF**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan var um fínt flogbóltsvikuskifti hjá SÍ-kvinnunum.

Higar til hevur SÍ bygt sær eina greiða leiðslu, og hendan gjørdist sterkari um vikuskiftið.

Dráttur snávaði nevnliga, tá tær á heimavølli spældu móti ÍF. Úrslitið av dystinum gjørdist ein greiður 3-0 sigur til ÍF, og tað bendir á, at fuglfjarðakvinnur væl kunnu gera onkran hampuliga stóran vørr, sum árið gongur.

Í Sørvági hevði oddaliðið heimavøll móti KÍF, og hóast gestirnir gjørdu ein vørr at byrja við, so var hetta als ikki nóg mikið móti SÍ, sum veruliga vant seg upp, so hvørt sum settini gingu.

Seinasti dysturin hetta vikuskiftið var í Trongisvági, har TB var nær við at fáa síni fyrstu stig. TB hevði vitjan av Fleyr, og tó at Fleyr vann dystin 3-1, so vóru tær javnt og samt trýstar av einum heimaliði, sum enn eina ferð er í holt við at byggja sær eitt nýtt lið upp.



*Kvinnurnar hjá SÍ styrktu oddastøðuna um vikuskiftið. Munurin til næsta liðið er nú seks stig*

*savnsmynd*

**Úrslit**

**Eik-ligan, kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| Dráttur-ÍF | 0-3 | (19-25, 25-27, 21,25) |
| SÍ-KÍF | 3-1 | (13-25, 27-25, 25-17, 25-12) |
| TB-Fleyr | 1-3 | (22-25, 25-22, 23-25, 23-25) |

# Seinkað heimferð

**Italska flogfelagið, sum argaði í Moskva, hevur aftur seinkað føroyska hondbóltslandsliðnum**

Hondbóltur
Jákup Mørk
HYPERLINK „mailto:jakup@sosialurin.fo“ jakup@sosialurin.fo

Tað skal bara ikki vera serliga lætt hjá føroyska hondbóltslandsliðnum at ferðast.

Tá farast skuldi úr Moskva til Italia, komu menn brádliga eftir, at einki flogfar hjá Al Italia stóð á breytini. Mest sum á miðjari nátt mátti starvsfólk hjá Atlantic Airwasy ígongd við at umbóka alt ferðaliðið, og støðan var ikki heilt ólík, tá ferðalagið nú skuldi aftur til Føroya.

- Flogfarið, sum vit skuldu við, var í øllum førum avlýst. Men vit hava umbókað allan hópin, og gongst eftir ætlan, flúgva vit úr Rom um ellivu-tíðina lokala tíð, segði Dia Midjord, tá vit høvdu orðið á hann í morgun.

Soleiðis kemur hópurin nakað seinni enn ætlað til Keypmannahavnar, men eftir øllum at døma verður tað kortini so, at landsliðið kemur til Føroya í kvøld.

Um enn so hetta verður nakrar tímar seinni, enn ætlað.

**Flogbóltur**

**Eik-ligan, kvinnur**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 8 | 8 | - | 0 | 24 | 9 | 15 | 16 |
| 2 Fleyr | 8 | 5 | - | 3 | 17 | 13 | 4 | 10 |
| 3 Dráttur | 8 | 5 | - | 3 | 17 | 14 | 3 | 10 |
| 4 Mjølnir | 7 | 4 | - | 3 | 14 | 10 | 4 | 8 |
| 5 ÍF | 8 | 4 | - | 4 | 16 | 13 | 3 | 8 |
| 6 KÍF | 8 | 1 | - | 7 | 11 | 21 | -10 | 2 |
| 7 TB | 7 | 0 | - | 7 | 2 | 21 | -19 | 0 |

